Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



# Próvhandan á Tekniska

**Fríggjadagin 24. juni var próvhandan á Tekniska Skúlanum í Tórshavn**

TÍÐINDASKRIV

Tey sum fingu prógv henda dagin vóru:

- SIT 1. støðisár
- SIT 2. støðisár
- Lærlingar
- Framleiðslutøkningar

Í alt vóru 95 prógv handað til próvhandanina, sum var á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin. Umleið 350 fólk høvdu leitað sær niðan á Skúlaheimið henda góðveðursdagin.

Umframt tónleik, sum var framførdur av ungu tónleikarunum í "PARADOX", hevði Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, eina røðu til nýklæktu næmingarnar og sveinarnar.

Gongdin í samfelagnum seinastu árini hevur havt við sær, at býtið millum lærlingar og SIT næmingar er broytt soleiðis, at tað í dag koma færri lærlingar í læru. Hinvegin taka fleiri miðnámsútbúgvingina, SIT.

## S.I.T. (støðisútbúgving innan tøkni)

Tað tykist, sum vinnan hevur tikið SIT -útbúgvingina til sín, og eru tað í dag fleiri virkir, sum heita á ungfólk, um fyrst at taka fyrsta støðisárið í SIT, áðrenn tey fara í læru. Á henda hátt fáa lærlingar góðskrivað fyrsta og í summum førum eisini annað skúlaskeiðið í lærlingaútbúgvingini.

Tey, sum halda fram í SIT annað støðisár, hava møguleikan at fara í eina framhaldandi útbúgving. Nevnast kann Maskinmeistaraútbúgving - Framleiðslutøkning - Byggitøkning - KT og Elektroniktøkning o.a. framhaldandi útbúgvingar.

## Lærlingaútbúgving.

Lærlingaútbúgvingin, sum í dag er 4 ár, er ein útbúgving, har lærlingurin skiftisvís er á læruplássinum og í skúla. Býtið millum lærupláss og skúla er soleiðis, umleið tveir triðingar av lærutíðini eru á læruplássinum og ein triðing av tíðini í tekniskum skúla.

Nógvir lærlingar halda fram í yrkinum, men tað eru eisini nógv, sum velja at taka eina framhaldandi útbúgving. Framhaldandi útbúgvingarnar eru, eins og hjá SIT -næmingum, tengdar at teirri útbúgving, tey hava tikið.

Umframt tær áðurnevndu framhaldandi útbúgvingarnar kunnu nevnast, el installatør, maskin og bygningsverkfrøðingur.

## Framleiðslutøkningar.

Fyri 4 árum síðani fór Tekniski Skúlin í Tórshavn undir at bjóða fram útbúgvingina, sum í Danmark kemur undir Erhvervsakademi útbúgvingar og nevnist henda útbúgvingin Produktionsteknolog. Í Føroyum hevur útbúgvingin fingið heitið "Framleiðslutøkningur"

Framleiðslutøkningaútbúgvingin er ein tvey ára framhaldandi útbúgving. Tey, sum verða upptikin til útbúgvingina, hava antin sveinabræv, eina studentsútbúgving -HH - HIF - HF - HT ella aðra hægri miðnámsútbúgving.

Seinasta lestrarárið verður arbeitt í tøttum samstarvi við virkir í vinnuni.

Nevnast kann, at allar tær endaligu verkætlaninar eru gjørdar í tøttum samstarvi við vinnuna, og at nakrar av teimum verða "patanteraðar". So sigast má, at hetta er ein útbúgving, sum bæði vinnan og næmingarnir fáa stóra nyttu av.

Í august 2005 byrjar Tekniski Skúlin í Tórshavn enn eina framhaldandi útbúgving, undir somu skipan og nevnist henda útbúgvingin "Byggitøkningur". Gongur sum ætlað, verður enn ein framhaldandi útbúgving sett í verk um 2 ár. Hetta er ein útbúgving innan KT og elektronik umráðið.



*2. støðisár innan el – úr vinstru: Brian Bech Jacobsen, Sørvágur; Gunnar Joensen, Hoyvík; Harry Schiller Jacobsen, Havn; Jógvan Sofus Thomassen, Miðvágur; Ragnar Johannesen, Tvøroyri; Sunleiv Christiansen, Leirvík og Sveinur Jacobsen, Havn*



*Sveinastykki innan el – úr vinstru: Áki Hølk Hansen, Miðvágur; Bjarni í Dali, Havn; Gisli Sveinbjørnsson, Vágur; Hanus Thomsen, Skáli; Louis Herason, Glyvra, Glyvrar; Sigtór Andreassen, Havn; Sofus Árni Højgaard, Søldarfjørður og Súni Joensen, Nólsoy.*



*Sveinastykki maskinsmiðir – úr vinstru: Bárur Tindskarð, Havn; Eirikur Norðberg, Vágur; Eyðstein í Lágabø, Vágur; Haakon M. Djurhuus, Leirvík; Jóan Jakku D. Thomsen, Sandavágur; Jonas Johannesen, Tvøroyri; Kári í Lágabø, Vágur; Karstin Kristiansen, Leirvík; Magni Jøkladal, Fuglafjørður; Odmar Pætur Niclasen, Havn; Poul Anker Zachariassen, Argir; Rani Christophersen, Sandavágur; Regin Olsen, Sandavágur og Torkil Johannesen, Miðvágur.*
*Á myndini vantar Pætur Joensen, Saltangará*



*Framleiðslutøkningar – úr vinstru: Anita Knudsen, Glyvrar; Bjarni A. Gregoriussen, Havn; Eivind Hansen, Norðragøta; Gunnar Hentze, Norðragøta; Henrik Askham Olsen, Árnafjørður; Jákup Egil Joensen, Sandvík; Julius Steffensen, Kollafjørður og Leif Klein, Argir.*
*Á myndini vantar Martin Djurhuus, Havn*